# Hava gjørt somu sparingar

*Fyri seks árum síðani fóru fysioterapeutarnir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi niður í 2,5 størv, men ambulanta viðgerðin er ongantíð niðurløgd*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fyri seks árum síðani høvdu sparingar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi við sær, at fysioterpeutdeildin fór úr 4,5 niður í 2,5 størv. Hetta hevur tó ikki havt somu álvarsligu fylgjur við sær, sum tað nú verður væntað, at sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahús fara at føra til.

Hóast summir sjúklingar eru fluttir frá sjúkrahúsinum til privatan fysioterapeut, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús framvegis nógvar ambulantar viðgerðir.

Í 1998 vóru fleiri enn 14.000 ambulantar viðgerðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Umframt hetta tal hava tað verið stívliga 9.000 viðgerðir av fólki, sum hava verið innløgd.

– Øll tey fólkini, sum vit leggja undir skurð, fáa eftirviðgerð á sjúkrahúsinum, um tey hava brúk fyri fysioterapi. Og tey fólkini, sum skulu í hylin ella hava brúk fyri tólum, sum bara vit hava, sleppa eisini fram at hjá okkum, hóast tað er ambulant viðger, sigur Jákup Petersen, yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahús.

Suðuroyar Sjúkrahús hevði í fjør umleið 22.000 fysioterapeutiskar viðgerðir, har av vóru umleið 14.000 ambulantar. Tað er hesin parturin av arbeiðnum hjá fysioterapeutin, sum má niðurleggjast, um sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi skulu gjøgnumførast.

Hildið verður ikki, at tað fer at bera til at halda fram við ambulantari viðgerð, tá talið á starvsfólkum verður skorið úr 3,9 niður í 2,5 fólk.

**Bert ein maskinmann**

Harafturat er ætlanin at siga einum maskinmanni upp, og tað heldur Bogi Djurhuus, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi, kann fáa álvarsligar fylgjur.

Í samrøðu við Sosialin hósdagin segði hann, at í ringasta føri kann sparingin fara at kosta mannalív.

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur síðani fyrst í 90'unum bert havt ein maskinmann til arbeiðis.

– Vit umhugsaðu gjølla sparingina, men eftir at hava viðgjørt støðuna væl og virðiliga avgjørdu vit at spara ein maskinmann. Hetta hevur ongar trupulleikar givið okkum síðani, sigur Jákup Petersen, yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

– Tað er ómetaliga sjáldan, at vit hava akuttar skurðviðgerðir uttan fyri vanliga arbeiðstíð, og tí er sannlíkið fyri, at nakað skal henda tólunum júst tá ógvuliga lítil. Tær ferðirnar, tað kundi hent okkurt, ber til at finna kvalifisera fólk at loysa trupulleikan.

– Enn hava vit ongantíð verið í námind av, at tað skuldi gerast ein trupulleiki fyri sjúklingar, at vit bert hava ein maskinmann, sigur hann.





*yri seks árum síðani høvdu sparingar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi við sær, at fysioterpeutdeildin fór úr 4,5 niður í 2,5 størv. Hetta hevur tó ikki havt somu álvarsligu fylgjur við sær, sum tað nú verður væntað, at sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahús fara at føra til*

**Ynskist til keyps**
Minibussur (taxabussur) til 8 ferðandi.
Tlf. 37 21 10
Mob. 21 52 10

**Tøkk**

Vit bæði takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum silvurbrúdleypsdagin 28.12.99.

Vinarliga
Sigrún Mohr og Hans J. Hermansen

**Reyði krossur Føroya**
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$
212380

**USA Visum happadrátturin**
International Refugee Support Agency (IRSA) (Altjóða Umboðsstova fyri Flóttafólkastuðul) hjálpir fólki at søkja um 2000 USA Visum happadráttin. Fyri at gera seg galdandi mugu umsøkjarar í minsta lagi vera 19 ára gamlir og hava skúlagongd svarandi til High School ella 2 ára arbeiðsroyndir. Fyri at fáa eitt IRSA góðkent umsóknarblað, send ein svarbrævbjálva áskrivað bústað og eina altjóða svarkupong (ella US$ 1 fyri postgjald) innan 29. febr. 2000 til:
Forms
IRSA
Suite 0116-204
65 Front Street West
Toronto, Ontario, Canada, M5J 1E6

Halt sosialin

**Robustar blandimaskinur**
•Tvangsblandarir 38–800 ltr.
• Blandimaskinur 130 – 180 ltr.
• Breitt úrval av stav og bjálka-vibratorum
Fáast við el, bensin ella dieselmotori
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

ÚTSØLAN byrjar mánamorgunin kl. 9.00
Wrangler shop
N. Finsensgøta 23 Tel 31 47 10

2 árin

Leygardagur 22. januar 2000

**Dramaið í Borgshavn**

Í 1982 kendi Torbjørn Jacobsen seg noyddan at seta Norðvíking á land í Vesturgrønlandi



# Eivør og dreymurin



*Seinasta hálva árið hevur 16 ára gamla Eivør Pálsdóttir lagt alla orku í tónleikin. Hon gavst í fólkaskúlanum eftir 9. flokk, og stóri framtíðardreymurin er fáa eina yrkisleið sum tónleikari.*

Síða 18 & 19

**Grenj partur av lívinum**

